# 50 tons av nýggjum stáli og jarni



*Henda nýggja kravkúgvin kom til Føroya fyrst í vikuni, og nú skal hon byrja at arbeiða uppi í Hundsarabotni.*

**Asfaltverkið í Hundsarabotni kundi í gjár gleða seg yvir nýggjasta familjulimin. Tað er ein nýggj kravkúgv. Kostnaðurin er 3,2 milliónir krónur**

ARBEIÐSTÓL
*Heri á Rógvi*

Teir vóru nógvir og spentir. Arbeiðsfólki á maskinverkstaðnum hjá landsverkfrøðinginum í Kollafirði. Tað var kanska heldur ikki uttan orsøk. Tí tað stóð ein spildurnýggj kravkúgv á verkstaðnum. Tað er heldur ikki á hvørjum degi, at Landsverkfrøðingurin fær hendur á einari nýggjari kravkúgv.

Í sambandi við, at nýggja kravkúgvin skuldi gerast klár til at fara til arbeiðis uppi í Hundsarabotni, vóru eisini komnir nakrir menn úr Danmark at rigga nýggju kravkúnna til. Tá Sosialurin vitjaði, so vóru teir við at gera teir síðstu fyrireikingarnar klárar, áðrenn kravkúgvin kundi fara avstað niðan í Hundsarabotn, har hon skal avloysa eina fimtan ára gamla kravkúgv, sum skal flytast til Lambareiði, har hon skal virka restina av sínari livitíð.

### Amerikanskt Volvo

Nýggjasta ískoyti í familjuna uppi í Hundsarabotni er av merkinum Volvo. Tað er ein Volvo L330 D, um tað sigur onkrum nakað. Kravkúgvin er gjørd yviri í Sambandsríkinum, í North Carolina.

Krúgvin vigar, tá hon stendur fult útgjørd, 50 tons. Longdin er 10,5 metrar, breiddin er 4 metrar og tú skalt fýra metrar upp í luftina, um tú ynskir at nerta við toppin á stýrihúsinum.

Kravkúgvin hevur tvey stempul. Hon er evnað úr stáli og jarni og so hevur ein dámligan gulan lit.

Fert tú innar í stýrihúsið, so er kravkúgvin mestir lík einum nýggjum bili, tí har eru allir hentleikar. Tað er kanska einans fløskuhaldarin, sum væntar, men tað hava teir døgurðasteðgin til. Har er útvarpstól, so førarin ikki nýtist at keða seg, tá dagarnir gerast langir.

Eisini er stýrispinnur, soleiðis at tað gerst alsamt lættari at arbeiða við nýggju kravkúgni.

Kostnaðurin er eisini rættiliga høgur. Prísurin fyri bara skuffuna er 276,00 kr. og fyri øll 50 tons kostar tað 3,2 míó kr.

Hinvegin, so klárar hon eisini at fylla ein lastbil uppá ógvuliga stutta tíð.



*Torbjørn er fegin um nýggju kravkúnna, sum hann skal koyra*

### Torbjørn koyrir

Tá nýggja kravkúgvin fór út frá verkstaðnum í Kollafirði, og tá nýggja maskinan kemur at verða nýtt í Hundsarabotni, so verður tað Torbjørn Thomsen úr Kollafirði, sum kemur at sita í stýrihúsinum. Tey flestu kenna kanska Torbjørn frá talv.

Hann er royndur førari, og hann smæddist heldur ikki burtur, tá nýggja maskinan skuldi fáast upp á pláss í gjár.

Uppgávan hjá nýggju kravkúnni og Torbirni verður at fylla ein dumpara, sum síðani koyrir gróti í knúsaran, sum er uppi í Hundsarabotni.

# Seyðavika í skúlanum í Sumba

**Hesa vikuna hava skúlabørnini í Sumba rættiliga fingið roynt seg. Mikudagin ótu tey døgurða og tá høvdu tey sjálvi fingið hann til vega. Tey høvdu flett ein seyð og gjørt burtur úr. Eisini eplini høvdu tey tikið upp**

SKÚLASKAPUR
*Dagfinn Olsen*

At koma á gátt í skúlanum í Sumba mikudagin var hugaligt. Matarroykurin stóð í næsarnar, tá hurðin varð latin upp. Á borðinum í skúlanum í Sumba stóð bæði seyðarhøvd, rullupylsa, blóðmør, sperðil og stokt og kókað seyðakjøt.

Skúlin hevur hesa vikuna havt evnisviku og tey keyptu eitt lamb. Tey hava flett og gjørt allan hugsandi mat burturúr. Tey hava verið við í gongdini frá byrjan til enda, frá fletting til borðhald.

Sjálvt eplini hava tey sjálvi tikið upp. Alt er liður í evnisvikuni um seyð. Og væl kom burturúr. Umframt, at væl gagnaðist mikudagin, hava skúlabørnini í Sumba eisini kannað ymiskt í samband við seyð og seyðahald.

Millum annað hava tey funnið útav, at í bygdini eru 252 veðrar. Til sammetingar kann nevnast, at í Sumba búgva eini 270 fólk, so tað er næstan ein veðrur uppá fólkið.

– Hevði hetta verið í Havnini, so skuldu eini 17.000 veðrar til, skemta lærararnir, ið eru væl nøgdir við evnisvikuna, eins og næmingarnir. Fríðbjørg J. Poulsen, Arnfinnur Bjarkhamar og Rólant Nónfjall eru lærarar í Sumba og Maibritt úr Hørg hevur svimjing o.a. við næmingunum.

Næmingarnir hava fylgt og verið við í allari gongdini, frá fletting til borðhald. Men her steðgar gongdin ikki. Tá maturin var komin niðurum mikudagin, vóru hósdagurin og fríggjadagurin eftir. Og hesir dagarnir fóru til ullina. M.a. gjørdu næmingarnir penalarhús úr ull.

Skúlin í Sumba hoyrir ikki til teir mest nýmótans bygningarnar í landinum, men ætlanir hava longi verið um ábøtur og útbygging, men enn er einki hent. Serstovur eru ongar og heldur ikki fimleikarhøll. Men ikki altíð eru tað fínu ytru umstøðurnar, ið bera verkinum uppi. Uppfinnsemi og ágrýtni røkka langt og tað er prógvað í skúlanum í Sumba hesa vikuna.

*Í Sumba hava skúlabørnini hesa vikuna havt evnisviku um seyð. Tey hava flett og gjørt burturúr og væl hevur eydnast og væl gagnaðist*





*Maibritt úr Hørg, Fríðbjørg J. Poulsen og Arnfinnur Bjarkhamar og eru væl nøgd við evnisvikuna um seyð, har m.a. funnið er útav, at nærum ein veðrur er uppá fólki í Sumba*



# Hjálpin er vís

**Ætlar Sjálvsstýrisflokkurin veruliga at hækka fólkapensiónina á komandi fíggjarlóg, skal ikki standast á at fáa stuðul frá stóru andstøðuflokkunum, siga bæði Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin**

FÍGGJARLÓG
*Edvard Joensen*

Fíggjarnevndarlimirnir hjá bæði Javnaðar- og Sambandsflokkinum fara at taka undir við uppskoti frá Sjálvsstýrisflokkinum um at hækka fólkapensiónina. Teir vita eisini, hvussu hon skal fíggjast.

Tað fer ikki at standa á hjá Helenu Dam á Neystabø vegna Sjálvsstýrisflokkin at fáa stuðul frá stóru andstøðuflokkunum til at hækka fólkapensiónina. Bæði Vilhelm Johannesen, fíggjarnevndarlimur Javnaðarfloksins, og Lisbeth L. Petersen, formaður og fíggjarnevndarlimur Sambandsfloksins, taka undir við eini hækking. Tey vita eisini, hvussu hon skal fíggjast, hóast tey hava ymisk boð.

### Hækka blokkin aftur

Vilhelm Johannesen úr Javnaðarflokinum vísir á, at flokkurin á landsfundi í september mælti til, at tiknar verða upp samráðingar við danir um at hækka blokkin aftur til tað, hann var, áðrenn verandi samgonga fór at skarva av honum.

Blokkurin var ætlaður til til júst mál sum pensiónir og heilsumál, so tað skuldi einki verið at ivast í at brúkt hann til tað, vísir Vilhelm Johannesen á. Hann sigur tað vera heilt burturvið av samgonguni at skerja heildarveitingina, so leingi hesi málini ikki eru fingin upp á pláss.

Annars vísir hann til uppskotið um samhaldsfasta arbeiðsmarknaðargrunnin, sum saman við fólkapensiónini skal tryggja pensionistunum sína inntøku.

Jú, Javnaðarflokkurin atkvøður fyri at hækka fólkapensiónina.



*Vit skulu nokk hjálpa Sjálvsstýrisflokkinum við at hækka fólkapensiónina. Men so fer tað at kosta játtanina til fullveldið, sigur Lisbeth L. Petersen, formaður í Sambandsflokkinum*

### Burtur við fullveldinum

Lisbeth L. Petersen úr Sambandsflokinum sigur, at flokkurin tekur eisini undir við at hækka fólkapensiónina. Hon sigur seg fegnast um, at Sjálvsstýrisflokkurin nú er farin at taka undir við hesum málinum, sum Sambandsflokkurin annars hevur brúkt nógva tíð uppá, uttan at lurtað hevur verið eftir honum.

– Er tað hetta, sum samgongan ætlar, skulu vit nokk hjálpa teimum, sigur hon.

Um hvussu ein hækking av fólkapensiónunum skal fíggjast, er Lisbeth L. Petersen ikki í iva. Pengarnir skulu takast av játtnanini til sjálvsstýrismál, sigur hon. Tann játtanin eigur at strikast av fíggjarlógini, heldur formaður Sambandsfloksins.

Men hon er kortini eitt sindur í iva um, hvat tað veruliga er, sum Sjávsstýrisflokkurin og samgongan vilja í hesum málinum. Men tað verður nokk ikki so lætt at fáa greiði á, heldur hon, tí tað tykist ikki, sum samgongan sjálv veit, hvat hon vil.

Jú, Sambandsflokkurin atkvøður fyri at hækka fólkapensiónina.

### Finna út av tí

Eisini fíggjarnevndarlimur Sjálvsstýrisfloksins, Kári P. Højgard, tekur sum vera man undir við uppskoti formansins um at hækka fólkapensiónina.

Hvussu fíggjast skal, sigur hann, at tí man samgongan nokk fara at finna útav.

Landsstýrismaðurin við fíggjarmálum, hevur boðað frá einum bata, sigur Kári P. Højgaard, sum tó ikki nágreiniliga dugir at siga, hvør batin verður. Men skatturin fer tó ikki at hækka, er hann vísur í.

Kári P. Højgaard sigur, at fíggjarlógarkarmurin verður væntandi ikki víðkaður, sum so aftur merkir, at hann vil finna pengarnar til hækkaða fólkapensión av øðrum játtanum á fíggjarlógini.

Men hvaðani teir skulu koma, vil hann ikki gera viðmerkingar til. Tað er nakað, sum samgongan í sátt og semju fer at finna fram til, sigur hann.

Hann takkar andstøðuni fyri stuðulin í hesum málinum, men metir tó, at tað fer samgongan sjálv at klára.

Jú, Sjálvsstýrisflokkurin atkvøður fyri at hækka fólkapensiónina.

## Einki oyra frá samferðsluni

**Tað verður einki oyra flutt av játtanini til samferðsluna at hækka fólkapensiónir við, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður við vinnumálum**

FÍGGJARLÓG
*Edvard Joensen*

Landsstýrismaðurin við vinnumálum sigur, at skal fólkspensiónin hækkast, sum Sjálvsstýrisflokkurin vil, mugu pengar finnast aðrastaðni enn á játtanini til samferðsluna, sum formaður Sjálvstýrisfloksins hevur nevnt sum ein møguleika.

Í sambandi við, at Sjálvstýrisflokkurin mælir til at hækka fólkapensiónina á komandi fíggjarlóg, segði Helena Dam á Neystabø, flokksformaður, at ein møguleika at fíggja hækkaðar pensiónir er at flyta pengar av øðrum játtanum á fíggjarlógini. Í tí sambandi nevndi hon, at landsstýrismaðurin við fíggjarmálum hevði verið gávumildur, tá talan var um játtan til samferðsluna í uppskotinum til komandi fíggjarlóg.

Í tí sambandi sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður við vinnumálum, í stuttari viðmerking, at tað kemur als ikki upp á tal at skarva av játtanini til samferðsluna. Hon er einki vaksin í mun til undanfarin ár. Reelt er hon heldur minkað, sigur hann. Tað, sum ger, at talið er eitt sindur vaksið, er at nýtt Suðuroyarskip skal smíðast, og har eru settir lutvíst nógvir pengar av, vísir Bjarni Durholm, landsstýrismaður á.

# Ringt at taka í álvara

**Bæði Miðflokkurin og Tjóðveldisflokkurin vilja geva pensionistunum hægri inntøku. Men Sjálvsstýrisflokkurin er ringur at taka í álvara, heldur Miðflokkurin**

FÍGGJARLÓG
*Edvard Joensen*

Jenis av Rana, tingmaður Miðfloksins, og Heini O, Heinesen, fígjarnevndarlimur Tjóðveldisfloksins, taka báðir undir við at hækka fólkapensiónina, um fígging fæst. Sostatt er meiriluti á tingi fyri uppskotinum hjá Helenu Dam á Neystabø.

Jenis av Rana er tó í iva um, hvørt Helena Dam á Neystabø nú meinar tað í álvara, sum hon skjýtur upp.



*Hasi fólkini, sum leggja slíkt fyri tingið, kunnu ikki takast í álvara. Men vísa tey á eina skilagóða fígging, tekur Miðflokkurin undir við teimum, sigur Jenis av Rana, tingmaður*

– Tað er sera ringt at taka hasi fólkini í álvara, sigur hann. Tí tey hava nú havt hálvtfjórða ár at koma við hasum hækkingunum, uttan at nakað nevnivert er hent. So at koma við slíkum nú, ófráboðað, tá fíggjarlógin er komin til viðgerðar, er óseriøst, heldur hann.

Men tað skal ikki standa á Miðflokkinum at fáa uppskotið samtykt, sigur hann.

Jenis av Rana sigur, at Miðflokkurin fer sjálvur at koma við einum øðrum uppskoti, sum sigur, at fólkapensiónin skal vera skattafrí, eins og allar aðrar inntøkur, sum fólkapensionistar hava. Fult og aldeilis, sigur hann.

Hann tekur uppaftur, at hann trýr ikki rættiliga upp á hatta uppskotið hjá Helenu Dam á Neystabø, tí hann dugir ikki at síggja, hvussu tað skal fíggjast, uttan at hækka fíggjarlógina. Men hann vísir tó á, at um Sjálvsstýrisflokkurin nú stendur og manglar pengar, kundi hann bara latið vera við at lækka blokkin.

Jenis av Rana heldur annars, at lækkingin av blokkinum átti at farið til fólkaatkvøðu. Tað hevði fallið við brestin, er hann ivaleysur í.

Eisini fíggjarnevndarlimur Tjóðveldisfloksins, Heini O, Heinesen, er fyri at hækka fólkapensiónina, um skilagóð fígging fæst til tað. Men hannn ivast í, hvaðani hon skal koma.

– Tað verður so ikki við at hækka fíggjarlógina, tí so fer hon at geva hall, og tað ganga vit als ikki við til.

Hinvegin gongur Tjóðveldisflokkurin inn fyri samhaldsføstu hugsjónini. Tann samhaldsfasti er nógv tann skjótasta loysnin á málinum, sigur Heini O. Heinesen.

Skal fólkapensiónin hækkast, sum Helena Dam á Neystabø vil, skal okkurt annað takast av aftur fíggjarlógini, vísir fíggjarnevndarlimur Tjóðveldisfloksins, á.

Hvat tað skal vera, má Helena Dam á Neystabø sjálv finna fram til. Heini O. Heinesen væntar ikki fulla semju um tað í samgonguni, sigur hann. Hann metir hetta útspælið hjá Sjálvsstýrisflokkinum í heila tikið at vera løgið, sigur hann.

Men kann Sjálvsstýrisflokkurin vísa á eina skilagóða fígging til hækkan av fólkapensiónini, tekur hann undir við tí.

Og so er meiriluti á tingi fyri uppskotinum hjá Helenu Dam á Neystabø um at hækka fólkapensiónina komandi ár.